# Vegleiðing til Netfundir

BANKNORDIK

Nú ber tað til at hava fund við tín ráðgeva á netinum. Tað er lætt og krevur ongar serligar tøkniligar førleikar ella telduforrit, og hartil er alt samskiftið trygt.

Her er ein stutt vegleiðing, ið vísir, hvussu netfundir fara fram á snildfon og teldli. Harafturat fært tú nøkur góð ráð um viðurskifti, ið tú eigur at hava í huga, tá ið tú hevur netfund við tín ráðgeva.

## Góð ráð í sambandi við netfundir

At hava netfund er eitt sindur øðrvísi, enn tá ið tú hevur fund við tín ráðgeva í bankanum. Her eru nøkur góð ráð:

1. Gott netsamband er neyðugt. Tað skal helst bera til at hyggja eftir einum videobroti á netinum.
2. Netfundir rigga best, um tú og ráðgevin síggja hvørt annað. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur eina friðarliga bakgrund, gott ljós í rúminum, og um tú ikki situr í mótljósi.
3. Kanna tøkniligu útgerðina, áðrenn tú fert í gongd.

## Soleiðis byrjar tú

1. **Bílegg netfund**. Set teg í samband við tín ráðgeva fyri at bíleggja ein netfund.
2. **Tá ið netfundur er bókaður**. Ein váttan um fundin verður send í Netbankan.
3. **Um tú ikki fært luttikið.** Set teg teg í samband við ráðgevan, so at fundurin kann flytast ella avlýsast. Tú fært eina váttan frá ráðgevanum, tá ið hetta er gjørt.

4. **Áðrenn tú luttekur.** Tak niður “Cisco WebEx Meetings” appina, ið verður nýtt til fundin.




# Luttak á fundi gjøgnum Netbanka-appina

Tú sært netfundin í Netbanka-appini, tá ið ráðgevin hevur bókað fundin.

Soleiðis luttekur tú á netfundi við at brúka Netbanka-appina:




1. Innrita í Netbanka-appina.
2. Vel **“Samband”** í breddanum ovast til høgru.
3. Finn **“Mínir Netfundir”**.
4. Trýst á **“Luttak nú”** (Bert møguligt 15 min. áðrenn byrjan).
5. Trýst á **“OK”** til fráboðanina.
6. Skriva síðani navn og teldupostbústað.
7. Trýst á **“Deltag via installeret app”** (Um tú ikki hevur tikið appina niður, verður tú biðin um at gera hetta, og síðani fara aftur til stig 4 omanfyri).
8. Trýst á **“Åbn”,** um appin biður um at lata upp í “Webex-Meetings”.




Netfundurin verður nú latin upp í WebEx-appini. Niðanfyri sært tú, hvussu tú brúkar appina.

# Luttak á fundi gjøgnum Netbankan

Um tú ikki hevur Netbanka-appina, ber tað eisini til at luttaka á netfundi við at brúka Netbankan.

Soleiðis luttekur tú á netfundi gjøgnum Netbankan:




1. Innrita í Netbankan á snildfon ella teldli.
2. Vel **“Samskifti”** í breddanum í vinstru síðu.
3. Vel **“Netfundir”**. Her sært tú eitt yvirlit yvir tínir netfundir (Mínir Netfundir).



4. Trýst á **“Luttak nú”** (Bert møguligt 15 min. áðrenn byrjan).
5. Trýst á **“OK”** til fráboðanina, ið verður víst.
6. Skriva síðani navn og teldupostbústað.
7. Trýst á **“Deltag via installeret app”** (Um tú ikki hevur tikið appina niður, verður tú biðin um at gera hetta, og síðani fara aftur til stig 4 omanfyri).
8. Trýst á **“Åbn”,** um appin spyr um at lata upp í “WebEx-Meetings”.

Netfundurin verður nú latin upp í WebEx-appini. Niðanfyri sært tú, hvussu tú brúkar appina.

## Luttak á Netfundi umvegis leinki

Um tú ikki hevur Netbanka, er eisini møguligt at luttaka á netfundi umvegis leinki, ið vit senda tær í telduposti.

Soleiðis luttekur tú á Netfundi umvegis leinki:




1. Trýst á leinki undir “**Deltag i Webex-møde**” ella á knøttin “**Deltag i møde**” í teldupostinum.
2. Um tú ikki hevur tikið WebEx- appina niður, verður tú biðin um at gera hetta, og síðani fara aftur til stig 1 omanfyri.
3. Skriva síðani navn og teldupostbústað.

Niðanfyri sært tú, hvussu tú brúkar WebEx-appina.

## Soleiðis brúkar tú WebEx-appina

Tá ið tú hevur trýst á “Luttak nú” í Netbankanum, letur WebEx-appin upp.

Soleiðis brúkar tú appina:

1. Tá ið tú ert til reiðar at luttaka, skalt tú trýsta á **“Deltag”**.
2. Trýst á **mikrofonina** fyri at tendra ljóðið (Tú verður biðin um at loyva appini at brúka mikrofonina á telefonini).
3. Trýst á **videotólið** fyri at tendra video (Tú verður biðin um at loyva appini at brúka myndatólið á telefonini).

**4.** Trýst á **“X”** fyri at enda Netfundin.




.